## Grønlendingar í námsvinnu



Í Grønlandi eru góð útlit fyri, at tað skal løna seg at vinna ymisk ráevni úr jørðini, og at námsvinna kann gerast ein sera týðandi vinnuvegur. Tnn stóri spurningurin er, um Grønland hevur nóg mikið av fólki til námsvinnuna, og tí er vinuskúlin í Sisimiut farin undir skeið, sum skulu fyrireika fólk til hesa vinnugreinina. Umframt kunnleika til ráevni og námsivnnu verður dentur lagdur á málsligan førleika, sigur stjórin, Jokum Møller, við KNR.

*Jokum Møller er stjóri á vinnuskúlanum í Sisimiut (Mynd: KNR)*

## Tinganes stuðlar ABC barnahjálp

Løgmaður hevur gjørt av at stuðla føroyska hjálparfelagsskapinum ABC barnahjálp í Føroyum við USD 180.000, tað er um 975.000 krónur, til verkætlan teirra í Liberia, »Nýggj vón til eitt nýtt ættarlið". Peningurin skal nýtast til at byggja skúla til 500 næmingar.« ABC barnahjálp hevur til endamáls at veita neyðstøddum børnum í menningarlondum varandi hjálp við útbúgving og uppihaldi. Byrjað verður at byggja skúlan í oktober, og faddurskipanin verður klár fyrst í komandi ári. (kelda: tinganes.fo)

# Føroyar hava nú fýra sendi-stovur



*Gunnvør Balle (t.v.) er føroyskur sendiharri í Reykjavík. Her avmyndað saman við Jóannesi Eidesgaard, løgmanni og íslendska uttanríkisráðharranum, Ingibjørg Sólrún Gísladóttir*
*Mynd: Hørður Sveinsson*





*Løgmaður fær hjálp frá leiðaranum á føroyska sjómansheiminum í Reykjavík, Ørkini, Símun Hansen, til at vinda Merkið á stong uttanfyri sendistovuna í Austurstræti 12*

*Myndir: Hørður Sveinsson*

**Leygardagin var móttøka í býráðssalinum í Reykjavík, tá Sendistova Føroya alment varð sett á stovn. Gunvør Balle, sum kemur úr einum starvi í Tinganesi, er fyrsti føroyski sendiharri í Íslandi**

ALTJÓÐA SAMSTARV

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tá sagt verður, at Gunvør Balle er fyrsti føroyski sendiharrin í Íslandi, er hetta ikki heilt rætt. Undir seinna heimsbardaga virkaði Hans Dalsgaard sum føroyskur sendiharri í Reykjavík, men av einhvørji orsøk varð henda sendistova stongd við krígslok, og tað skuldu sostatt ganga 62 ár, áðrenn vit fingu nýggja sendistova í okkara nærmasta grannalandi.

Leygardagin var móttøka fyri innbodnum í býrráðssalinum í Reykjavík í sambandi við, at sendistova nú aftur er latin upp í íslendska høvuðsstaðnum.

Samstarvið við íslendingar hevur altíð verið stórt á fiskivinnuøkinum, men seinnu árini er tað nógv vaksið á øðrum økjum. Serliga á handilsliga og fíggjarliga økinum. Formliga er politiska samstarvið skipað við Hoyvíkssáttmálanum.

Á móttøkuni leygardagin hildu Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og íslendski uttanríkisráðharrin, Ingibjørg Sólrún Gísladóttir, røðu, meðan systrarnar Jensina og Anna Maria Olsen stóðu